Kyndil-VÍF 33-29 (15-12):

# Rok tá Kyndil fangaði VÍF

**Fyri tað mesta var talan um ein sera góðan dyst, tá VÍF misti eitt álvarsligt fet móti Kyndli, sum nú er um at gerast partur av gullstríðnum. Men seinasta løtan av dystinum var ein skamblettur fyri føroyskan hondbólt**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Hóast Áki Olsen aftur gjørdi nógv um seg, so var hetta ikki nóg mikið hjá VÍF, sum vit ósigrinum ikki longur sjálvt kann avgera, hvønn veg FM-heitið skal fara*

16 útvísingar, trý reyð kort, 62 mál og dramatikkur og spenningur í stórum parti av dystinum. Somikið umfatandi var innihaldið, tá VÍF sunnudagin vitjaði Kyndil í fjórða innanhýsis dystinum millum risarnar í føroyskum manshondbólti.

Seinnu árini hevur tað fyri tað mesta bert verið hin eini av risunum, sum hevur gjørt um seg, men hesaferð varð tó øðrvísi. Eftir at teir fyri tað mesta hava verið steinrunnir seinnularini, er Kyndil nú um at koma fyri. Steypasigurin fyrr í vár var mest sum undristrikanin av hesum, og síðani hava teir mest sum havt beina kós framá.

### Betri tendraðir

Tað lá eisini alla tíðina í luftini sunnudagin, at tað skuldi gerast Kyndil, sum fór avstað við stigunum. Hóast vestmenningar høvdu allar hugsandi orsøkir at vera topp-tendraðir, nú teir eru í veruligum vanda fyri at missa FM-trúnuna, sum teir hava sitið so trygt á, so var tað onkursvegna so, at teir á heimaliðnum vóru meira uppsettir.

Teir løgdu størri orku hvønn einstakan bólt. Stríddust eitt vet manniligari í verjupartinum, og í álopspartinum var líka sum meira tyngd aftan fyri gjøgnumbrotsroyndirnar.

Tað eydnaðist eisini Kyndli hampuliga skjótt at vinna sær ein lítlan fyrimun, og tó at teir høvdu ilt við at sleppa heilt leysir av VÍF, so høvdu vestmenningarnir hinvegin meira enn ilt við at toga seg heilt nær mótstøðuni aftur.

Uppskriftin hjá Kyndli var annars í nógvar mátar lík henni, sum strandingar nýttu seinasta vikuskiftið. Við eini framskotnari verju har eittarin støðugt royndi at órógva miðleikaran hjá VÍF, syrgdi Kyndil fyri, at tunga bakspælið hjá VÍF ongan tíð kom upp í gear. Hinvegin setti Kyndil alla tíðina nógva ferð á, tá teir fóru niðan, og hvørja ferð umstøðurnar vóru til tess, varð kontra-møguleikin troyttur.

### Rok at enda

Og í seinna hálvleiki helt gongdin fram. VÍF royndi framvegis at toga seg innaftur í dystin við mongu málunum frá Áka og Inga Olsen, men tað var alla tíðina, sum um hetta ikki var nóg mikið. Hvørja ferð teir gulu tóktust hava fingið fatur á rætta endanum, so svaraðu teir á heimaliðnum aftur, og tá farið var um hálvan hálvleikin tóktist tað mesta vera avgjørt.

Kanska var tað vónbrotið hjá VÍF frá seinasta dystinum, sum enn sat í høvdinum. Í øllum førum tóktust teir nú geva skarvin fullkomuliga yvir, og munurin til teir grønu gjørdist alsamt størri. Munurin var øktur í fimm mál, og Kyndil kundi kanska økt enn meira um henda, men spakuliga fór nakað av ferð av spælinum hjá teimum.

Í eini seinastu roynd at venda gongdini fór VÍF langt út at verja seinastu minutirnar, men har gjørdist einki. Kyndil megnaði alla tíðina at svara aftur.

Hvørt tað vóru frustratiónir hjá vestmenningum, ella bara tekn um, at menn vóru sera tendraðir og ógvuliga heitir, er ilt at siga, men seinasta løtan av dystinum gjørdist í øllum førum nakað, sum ikki minti serliga nógv um hondbóltsspæl.

Ein at síggja til heilt vanlig dystarstøða, har Daniel Rápa royndi at bróta ígjøgnum, bleiv í øllum førum brádliga til nógv meira. Áðrenn nakran vardi, var stórur bardagi á vøllinum. Hvat, hví og hvussu var helst eingin, sum hevði greiðu á, og eisini fyri dómararnar kom hetta púrasta óvart á. Teir kundu illa gera annað enn at royna at fylgja við, hvat hendi, meðan spælarar fóru sendandi runt, umframt at ein kyndilsmaður brádliga lá eftirá.

Endin varð, at fýra mans – ein gulu og tríggir grønir – fingu march-ordra av vøllinum, og seks ímóti fýra fingu vestmenningar so avgreitt seinasta hálva minuttin ella so.

### Kyndil er við

Hendan seinasta løtan, hevði sum sagt einki sum helst við hondbóltsspælið at gera, men hon undirstrikaði kanska eisini, hvussu nógv stóð á hjá VÍF. Eftir at teir høvdu eina góða byrjan í endaspælinum, og eitt skifti tóktust skula taka nøkur avgerandi fet ímóti triðja gullinum á rað, er nú viðvent í holuni.

Tvey tap á rað hava í øllum førum viðført, at strandingar nú eru tvey stig frammanfyri við einum dysti til góðar, og at sjálvur gull-møguleikin tí er uttan fyri egna ávirkan. Hartil mugu vestmenningar nú eisini ásanna, at tað fyrst og fremst ræður um at halda Kyndil aftan fyri seg í løtuni.

Eftir eitt heldur misjavnt grundspæl hevur Kyndil nevnliga fingið fatur á endanum seinastu mánaðirnar, og sum spælið hevur verið seinastu dystirnar, skal tað als ikki útilokast, at teir eisini kunnu tosa við. Bæði um silvur og gull.

Skal hetta gerast veruleiki, er tó neyðugt við sigri í komandi dysti. Hesin verður á Skála, har StÍF tekur ímóti, og tað líkist í øllum førum einum røttum stórdysti. Og eitt er púrasta víst. Vestmenningar hava í øllum førum einki ímóti, at Kyndil eisini vinnur tann dystin, og fyri spenningin í kappingini vildi tað eisini verið framúr, um so var.

### Dysturin í tølum

**Kyndil-VÍF 33-29 (15-12)**
Málskjúttar:
Kyndil: Hans Áki Dal-Christiansen 10(3), Høgni Klein 7, Jacob Jónsson 6, Finnur Hansson 6(1), Janus Einar Sørensen 3, Leif Mikkelsen 1
VÍF: Áki Olsen 11(1), Ingi Olsen 8, Daniel Rápa 3, Joyhnny Joensen 2, John Zachariasen 2, Agnar Joensen 2, Ólavur Brimnes 1
Brotskøst: Kyndil 4, VÍF 2
Útvísingar: Kyndil 8, VÍF 8
Diskvalifikatiónir: Kyndil 2 (1 beinleiðis reytt og ein 3X2minuttir), VÍF 1 (3x2 minuttir)
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen. Høvdu rímuliga gott tak á, men loyvdu dekan ov nógvari togan. Hurlivasan seinastu løtuna kundu teir ikki gjørt stórt annað við enn tað sama.





*Regin Petersen var ein av kollfirðingunum, sum gjørdi eitt gott hál, tá KÍF smurdi eitt illa manna Tjaldurs-lið av*

KÍF-Tjaldur 42-23 (15-12):

# Runavíkin hevur givið upp

**Uttan nakran skiftisleikara varð ov tungt hjá runavíkingum at fylgja við kollfirðingum, sum uttan av overva seg vunnu stórsigur**

MANSHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Botnuppgerðin í bestu mansdeildini stóð á skránni í Hoyvíkarhøllini sunnudagin, tá tey bæði niðastu liðini á stigatalvuni hittust. Heitið var tó eitt sindur misvísandi, tí meðan Tjaldur er fullkomuliga avbyrgt í botninum, so er KÍF framvegis ikki so øgiliga langt frá liðunum, sum stríðast um bronsuna, og tí var einki at ivast í, hvat favorittleikluturin átti heima.

### Eingin skiftisleikari

Og longu við dystarbyrjan var mest sum greitt, at runavíkingarnir ikki høvdu nakrar serliga ætlanir um at broyta hetta. Gaman í hevur Tjaldur av og á havt hug at arga ovaru liðini, og okkurt stigið er eisini komið til høldar. Men hesa ferð møttu teir upp við sjey leikarum, harav tveir vóru málverjan, og so er altso ikki tað stóra, sum roknast kann við.

Og hoyvíkingarnir mundu eisini skjótt ásanna, at hendan dagin fingu teir ein sjáldsama lættan sigur. Uttan at spíla seg út, ella seta ferðina óneyðuga nógv upp, hildu teir allan fyrra hálvleik eitt gott tak á gestunum, og tá møðin so gjørdi seg galdandi í seinna hálvleiki, kundi heimaliðið veruliga gera sær dælt.

Ferð eftir ferð vórðu mistøk framd í Tjaldur-álopinum, og tá orkan ella hugurin at renna heim ikki var soleiðis, sum tað átti at verið, og tó at Dejan Lachok er millum stinnasti málverjarnar í landinum, so fekk hann ikki einsamallur vart fyri hesum.

### Lítið upp á seg

Við sigrinum tóku kollfirðingar seg eitt pláss upp á stigatalvuni, har teir nú eru á fimta plássinum. Sum kappingin er liðin, so er tað nú helst ov seint hjá teimum at leggja seg út í heiðursmerkjastríðið, men fyri tað kann liðið væl fáa onkra nyttu burtur úr eftirverandi dystunum. Fyrst og fremst á sálarliga økinum, har liðið í nógvum førum hevur liðið undir, at leikararnir ikki eru vanir við at vera á odda. Ein veikleiki, sum bert kann burturbeinast við at vinna fleiri dystir, og tað man fyrst og fremst vera hetta, sum leikararnir skulu hava í huga restina av árinum.

Hjá Tjaldri man restin av árinum hinvegin skula nýtast til at hugsa. At hugsa, hvørt liðið yvir høvur hevur nakað at gera í bestu mansdeildini. At leikararnir hava evnini til at gera seg galdandi, hava teir fleiri ferðir sýnt, men oftani er ilt at síggja nakran seriøsitet í avrikunum. Skal felagið vinna seg longur upp ímillum hini liðini í deildini, er fyrst og fremst neyðugt, at hondbóltsspælið verður tikið í størri álvara.

### Dysturin í tølum

**KÍF-Tjaldur 42-23 (15-12)**
Málskjúttar:
KÍF: Rógvi Weihe 8, Regin Petersen 8, Damir Oros 7(1), Hallur Hansen 4, Kristjan Madsen 4, Mirko Milenkovic 3, Gert Hansen 3, Vagnur Johannesen 3, Jónálvur Johannesen 1, Jákup Dam 1
Tjaldur: Dragisa Stojovic 10, Mortan Hansen 6(2), Ragnar Olsen 3, Tórhallur Thomsen 2, Arnfinn Langgaard 2
Brotskøst: KÍF 1, Tjaldur 3
Útvísingar: KÍF 5, Tjaldur 3
Dómarar úr TB: Kári Niclasen & Birgir Dimon.

VB-Neistin 31-23 (16-9):

# Fimm eru eftir

**VB vann eisini trygt á Neistanum, og eru nú bert fimm dystir frá einum søguligum meistaraheitið**

KVINNUHONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

VB høllin var enn einaferð full, tá kvinnuliðið hjá Neistanum kom á vitjan í Vági. Ofta hevur hesin dysturin verið ein av teimum meria torføru útidystunum hjá einum komandi meistaraliði, men í ár er støðan hin øvugta. Nú er tað VB, sum er ávegis einum meistaraheitið, og hetta er fyrst og fremst gjørt við einum ótakiligum heimavølli, har øll eru farin ongul í reyv heimaftur, tað sum higartil er liðið av kappingini.

### Skjót avgerð

Og tað var eisini skjótt at staðfesta, at her skuldi Neistin ikki gera sær nakra serliga vón um at broyta hagtølini fyri árið. Frá fyrsta bríksli setti VB ferð á, og tó at Neistin í ávísan mun kundi fylgja við í spælinum, so fingu tær als ikki fylgt við á máltalvuni, har heimaliðið eftir fyrstu 20 minuttunum hevði lagt seg seks mál framum.

Hetta vann Neistin seg ongan tíð yvir, og tá VB so í seinna hálvleiki slerdi eyðkenda kontraspælið til, tók dysturin alt meira skap av einum stórsigri. Mest sum hvørt tað einata mistak frá gestunum varð revsað við skjótum mótálopum, og skifti var munurin somikið stórur sum 12 mál, og tó at Neistin megnaði at minka nakað um seinastu løtuna, so kom ongan tíð spenningur í uppgerðina.

### Tað tykist heima

Og sum VB spælir í løtuni, so er eisini ilt at síggja, hvussu spenningur av álvara skal koma í gulldystin aftur. Gamaní er VÍF framvegis bert ein dyst frá teimum – treytað av at VÍF vinnur komandi innanhýsis dystin – men tað er trupult at síggja nakað lið, sum veruliga kann hótta VB. Síðani farið varð undir endaspælið, hevur verjan í nógvum førum verið átøk einum múri, soleiðis at kontra spælið ofta hevur koyrt við fullari ferð, umframt at hvørgin av teimum útlendskum tykist seta ferðina á málskjótingini niður.

Enn kann VÍF sum sagt skapa nakað av spenningi, um so er at tær vinna komandi vikuskifti, men framvegis er ilt at síggja, hvør so skal hjálpa teimum. Hinir fýra dystirnir, sum VB hevur eftir, eru heimadystir móti Kyndli, Stjørnuni og StÍF, umframt at talan er um útidyst ímóti Tjaldri, og allari virðing fyri mótstøðuni, so hava hesi ikki givið ábendingar um, at tað er nú, at VB skal takast, og so slettis ikki í Vági.

### Dysturin í tølum

**VB-Neistin 31-23 (16-9)**
Málskjúttar:
VB: Daiva Toumaite 11(5), Reda Kurkauskiene 7, Gurið Mortensen 5, Arnleyð Hjelm 3, Eyðdis Kjærbo 2, Mary Krosslá 1, Rannvá Augustinussen 1, Eyðbritt Krossla 1
Neistin: Simona Dziugyte 11(5), Jórun Ludvig 5, Christina Holm 3, Lív Sørensen 2, Susan Brockie 1, Rakul Augustinussen 1
Brotskøst: VB 5, Neistin 6
Útvísingar: Neistin 1
Dómarar úr Stjørnuni: Flemming Poulsen & Kristoffur Ragnarsson